Svarskriv frá Gjaldstovuni um fyrispurning frá Fíggjarnevndini, um hvussu KT skipanir hjá tí almenna hava hepnast seinnu árini

Ofta hoyra vit neiligar viðmerkingar um føroyskar kt-verkætlanir. Hetta er sera undarligt, tí samanborið við onnur lond og stórar útlendskar fyritøkur, so klára vit okkum sera væl at innføra nýtt kt hjá almennu Føroyum. Vit hava onga stóra skandalu, sum vit ofta lesa um í okkara grannalondum at vísa á, men hava hinvegin nógvar sólskinssøgur.

Kunnu vit samanbera okkum við tey stóru londini? Ja tað kunnu vit í stóran mun, tí ofta skulu okkara loysnir stuðla upp undir sama kompleksitet, sum í tí stóra landinum, tí londini byggja á somu værferðarmeginreglur. Munurin eru dátunøgdirnar, tá ið skipanirnar koma í rakstur. Hetta er eitt annað mál.

Her kann verða greitt frá nøkrum verkætlanum.

Skattaskipanin er eitt vælaverk, sum hevur virkað í meira enn 40 ár. Í 2016 varð skattaskipanin migrerað til ein nýggjan plattform. Ein stór verkætlan við nógvum váðum, sum hóast avbjóðingar eydnaðist væl. Bankarnir rindaðu ein stóran part av hesi migreringini. (Taks má koma við endaligu tølunum)

Búskaparskipan landsins verkætlanin, sum koyrdi fyri og eftir ártúsundskiftið og var ein reformur undir landsins búskaparstýring, var ein success. Búskaparskipan landsins kostaði okkurt um 80 mió. kr. yvir 20 ára skeið, sum eisini í dagsins pengum er ein sera góður prísur. Her vóru eingi yvirtrekk, og vit hava eina skipan í dag, sum er eitt sera virðismikið grundarlag undir allar búskaparstýring hjá landinum.

Talgilda heilsuskipanin, sum er grundarlagið undir øllum heilsuverkinum í dag kostaði um 100 mió. kr. yvir fyrsta 20 ára skeiði, kostaði ein brøkpart av, hvat tað kostar at seta slíkar skipanir í verk í Danmark. Her skulu vit hava í huga, at vit hava eina skipan fyri alt samfelagið, í mun til nógv meira sundurpettaðar loysnir í okkara grannalondum. Eingin ivi um, at THS skapar eitt nógv meira samanhangandi og effektivt heilsuverk, sum samstundis veitir betri sjúklingatrygd.

Almanaverkið hevur eisini ment eina stóra skipan, sum er grundarlagið undir øllum teirra virksemi. Verkætlanin byrjaði í 2007 og varð hóast seinkingar liðug okkurt um 2017. Almannaverkið má svara fyri endaliga kostnaðinum.

Talgildu Føroyar er eisini, samaborið við onnur lond, ein stór væleydnað verkætlan. Vit hava fingið ein Samleika, sum hevur kostað ein brøkpart av, hvat hann kostar í øðrum londum, sum í dag er grundarlagi undir talgilda samskiftinum, sum borgarar í dag hava við myndugleikar og fyritøkur. Við **einum** Samleika fyri allar týðandi talgildar tænastur, spara vit borgarum, myndugleikum og fyritøkum nógva tíð og útreiðslur. Vit ein Vanga sum longu við lansering hevði hópin av tænastum. Samanborið við onnur lond hevur Vangin førartroyggjuna. Skjáttan, sum kostaði 1,7 mió kr., sum er karmur um fleiri loysnir m.a. koyrikort, kostaði í Danmark 50 mió. kr., tá var tað bara talan um koyrikort. Heldin, sum er beinagrindin undir tryggum samskifti kostaði 6 mió. kr. Leggjast kann afturat, at Føroyar á eini konferansu í Tallin 2016 fekk eina heiðursgávu fyri tað landið sum skjótast og effektivast hevði innført henda plattformin. Á leið 1/3 av allari Talgildu Føroyar verkætlanini á 150 mió. kr. varð fíggjað av

fyritøkum og kommunum, og verkætlanin hevur verið grannskoðað av Landsgrannskoðanini á næstan hvørjum ári.

Skjalahaldverkætlanin varð ein verkætlan at samskipa 50 journalskipanir innan tað almenna og at uppstiga grundskipanina m.a. soleiðis at hon er á føroyskum. Hetta varð hildið innanfyri vanliga rastkrarkarmin av Landsneti.

Kervið+ er ein verkætlan, sum kostar góðar 40 mió. kr., sum skal sambinda og effektivisera fyrisitingina innan føroyska skúlaverkið. Verkætlanin er komin meira enn hálvvegis og heldur játtanina.

Hví eydnast vit so væl við okkara KT- og talgildingar verkætlanum? Vit hava eina kompetenta vinnu. Vit hava skjótt at taka avgerðir. Vit eru færri fólk inn yvir loysnirnar, samanborið við útlandið, og vit hava eina vælvirkandi almenna skipan.

Næstu árini eru fleiri stórar verkætlanir ávegis, m.a. skulu bæði TAKS og heilsuverkið í gongd við verkætlanir sum hvør sær liggja væl omanfyri 100 mió. kr. Skulu vit halda áfram at menna okkum sum samfelag, fer nøgdin av verkætlanum bara at halda áfram at vaksa. Fleiri KT-loysnir meira at halda viðlíka. Hetta viðlíkahald fer eisini at økja um talið av KT-verkætlanum. Fyri at tryggja, at vit arbeiða skynsamt við KT og talgilding, og at KT- og talgildingar verkætlanir ikki fara av sporinum, verður í løtuni arbeitt við einum rundskrivi fyri KT-verkætlanir og -loysnir, sum setur krøv til, at verkætlanir skulu skipast eftir nøktandi altjóða leisti, og at loysnirnar hava neyðug samfelagsatlit, m.a. at tær skulu brúka tað talgilda undirstøðukervið sum longu finst.

Leggjast skal aftrat, at skulu vit halda áfram við at talgilda samfelagið, liggja størstu uppgávurnar og møguleikarnir fyri sparingum og nyttu annars, úti hjá kommunum – serliga á eldraøkinum. Skulu vit eydnast at gera munagóð átøk á hesum fronti, krevst eitt munandi tættari samstarv og samskipan millum land og kommunur at røkka hesum málum.